# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Skeivur máti at spara

At neyðugt er at spara á fíggjarlogini, er lítið at ivast í. Føroyska samfelagið ber nú einaferð ikki meir enn eitt vist, tá tað kemur til skatting og almennar útreiðslur. Tíverri sær út til, at spart verður oftani í skeiva endanum, har summir av veikastu borgarnum merkja sparingarnar, heldur enn at royna at spara, har borgarin ikki merkir tað.

Landið eigur eisini at fáa onkran at hyggja at, hvussu effektivar skipaninar eru viðvíkjandi skattaumsiting, KT og fíggjarstýring. Skattainnkrevjing, tolling og umsiting av hesum øki eigur at verða so bíligt sum gjørligt. Ein sparing á einum slíkum øki kann helst fremjast, uttan at borgarin merkir stórvegis til tað.

Stjórnarráðini áttu eisini verið endurskoðað. Rættartrygd er ikki ein kvantitativur spurningur, men ein kvalitativur spurningur. So har skuldi eisini verið møguligt at spart, uttan at borgarin merkir stórvegis.

Vit mugu eisini ansa eftir ikki at skapa ein nýggjan stovn, hvørja ferð nýggj lóggava er samtykt. Føroyar eru ov lítlar til at hava eftirlitsstovnar á hvørjum horni. Um ein lóg krevur nógv eftirlit, so er hon helst ikki serliga hóskandi til føroysk viðurskifti.

Eisini átti ein nærri at umhugsað og diskuterað, hvørjum eftirlitum tørvur er á í Føroyum. Greitt er, at vit megna ikki at uppbyggja somu ekspertisu á øllum økjum, sum størru grannalondini kunnu. Filmseftirlitið er nu farið í søguna, og er tað eitt dømi, har vit nú dúva uppá ekspertisuna í grannalondunum. Ger tað nakað? Hvussu við t.d. matvørum og heiluvági? Um tað er loyvt at selja og eta í Danmark, Noregi, Íslandi ella Bretlandi, hví so ikki eisini gera tað loyvt í Føroyum?

Tað er í hvussu so er neyðugt, at vit endavenda øllum tí almenna sektorinum og spyrja óvanligar spurningar.

Tað er lítið at ivast í, at almenn starvsfólk flest arbeiða eftir førimuni innan teir karmar, sum nú einaferð eru settir, men hvør hyggur at karmunum? Vit mugu ansa eftir, at vit ikki enda í einari støðu, har man politiskt heldur seg burtur frá at tjakast um almenna sektorin, tí at ein og hvør kritikkur verður tikin sum álop á starvsfólkini. Tað er ikki so, og ein og hvør bólkur eigur at verða vigaður og mettur av øðrum enn sær sjálvum, heldur enn at verða friðaður frá allari diskussión.

Sitandi landsstýri hevur ikki nakra lætta uppgávu, men hon verður vónleys, um ein ikki byrjar úr erva og raðfestir soleiðis, at heilir stovnar verða endavendir ella niðurlagdir. At skarva nøkur prosent niðast í pyramiduni, har bara teir veikastu borgararnir merkja tað, er ikki vegurin fram.

**Sosialurin**

## Sparingar í hesum døgum

**ÁRNI VANG**

almennt løntur, sum roynir sítt besta



Eg kundi skrivað eitt langt lesarabræv, sum innihelt kenslur, ákærur og peikandi fingrar. Men velji heldur at seta nøkur fakta upp í punktform.

- Tey gomlu missa sítt stað at vera um dagarnar. Og stuðulin til heilivág verður minkaður
- Almenn starvsfólk skulu kannast t.d. uppmøtingin o.a.
- Fólk skulu fáa sær frí í eina viku uttan løn
- Útbúgvingar skulu avlýsast á Setrinum
- Børn við serligum tørvi skulu straffast fíggjarliga.
- Børn, sum hava havt keðiligar lagnur, skulu rakast av sparingum
- Fólkaskúlin skal spara allastaðni
- 1. floks børn skulu børn tvingast í skúlar, sum hava pláss

Hetta eru bara nøkur dømi á sparingar, sum okkara FÓLKAvaldu vilja hava framdar. Tað eru uttan iva okkurt, sum eg ikki havi nevnt, men tað er tí at eg ikki kom í tankar um tað, og ikki tí at eg helt tað ikki vera týdningarmikið.

Nú vil eg gjarna enda hettar lesarabræv við persónligum meiningum

**Til nr. 1:** Ja sjálvandi skulu pensionistarnir spara. Teir hava jú heldur ikki goldið og givið okkara samfelagið nakað (**les: IRONI, undirritaði**.)

**Til nr. 2:** Hvussu er við uppmøtingini í Løgtinginum? Vit síggja tað í Tingvarpinum!!! *Sjálvmál frá Kára P. Højgaard. Og eitt gott trekk frá Gerhard Lognberg, nú hann ikki fær Sandoyartunnilin, og tí flytur hann fokus yvir á almenn starvsfólk. Vónandi síggja sandoyingar eisini tað.*

**Til nr. 3:** Løgtingslimir kunnu ganga á odda og fáa sær frí uttan løn. T.d. 2 tær fyrstu vikurnar í januar, tá tit **ENN** vóru í jólaferiu, og t.d. almenn starvsfólk høvdu svarað telefonunum í 2 vikur.

**Til nr. 5 og 6:** Eru tað veruligani **TEY**, sum hava brúk fyri sparingum? Hava tit ongan "veikari" samfelagsbólk at fara eftir?

**Til nr. 7:** Jú sjálvandi skulu vit spara í fólkaskúlanum, tí hann er so væl fyri, tá tað kemur til undirvísingartilfar, hølisviðurskiftir, KT, endurútbúgving, nokk av útbúnum starvsfólkið.

Lærarar hava eisini sera góðar umstøður at gera sítt arbeiði í. Vit hava IKKI egna fartelefon, egna teldu og gjalda sjálvi fyri internet, sjálvt um vit SKULU brúka KT í undirvísingini. Vit hava ikki eingongd egið arbeiðsborð. Á jú, tað hava vit. Men tað er entin stovuborðið heima við hús ella eitt kontór, sum man sjálvur hevur goldið fullan prís fyri. Vit fingu ikki okkara kontórborð bíliga frá Løgtingshúsinum. (**les: IRONI, undirritaði**)

Tit siga altíð: *Børnini eru okkara framtíð. Børnini eru okkara virðismiklasta ogn*.

**Eg hoyri tykkum**.

**Til nr. 8:** Ja sjálvandi skulu børn, sum hava spælt saman í barnagarðinum og grannalagnum skiljast frá hvørjum øðrum, tá tey byrja í skúlanum. (**les: IRONI, undirritaði**)

Eg hoyri tað fyri mær – *Drongurin við mammu sína*: Hví sleppi eg ikki í skúla saman við mínum bestu vinmonnum á Argja skúla? Hví skal eg á Eysturskúlan?

*Mamman*: Tí tað siga hini fólkini, sum mamma og babba valdu til síðsta val.

Hvør fremur so hesar sparingar? Jú nógv hava givið Anfinn Kallsberg skylduna, og tað at hann vil hava handa tunnilin sum eftirmæli, men hvør hevur skylduna: **At tað hava tit øll FÓLKAvaldu og ikki bert Anfinn!!!**

## Villleiðandi upplýsingar frá fundi

**SIGNAR Á BRÚNNI**



**- ið varð hildin fyri afturlatnum hurðum, frá býráðsformanninum í Fuglafirði**

Gjørdist rættiliga illa við, tá ið útvarpið fyri stuttum hevði samrøðu við Sigurd Simonsen, býráðsformann í Fuglafirði, har m.a. málið um samanlegging av kommununum Gøta, Leirvík og Fuglafjørð varð umrøtt. Orsøkin til, at eg gjørdist illa við, var hon, at býráðsformaðurin greiddi frá, hvat var farið fram á býráðsfundi, ið varð hildin fyri afturlatnum hurðum og í øðrum lagi, at upplýsingarnir hann gav vóru villleiðandi.

Býráðsformaðurin hevði avrátt, at málið um kommunusamanlegging skuldi verða hildin fyri afturlatnum hurðum. Í tí liggur m. a. at einki verður sagt frá fundinum.

Fyrstur at bróta hesa mannagongd, er býráðsformaðurin sjálvur, við at siga, at eingin býráðslimur tók undir við kommunusamanlegging, og hetta endurtók hann.

Og tað sum verri er, er, at hetta er beinleiðis villleiðandi, tí tað sum sagt varð av m.a. mær, var, at tað var ótrúliga seint hjá sitandi býráði at taka støðu í hesum máli, nú tíðin var um at verða runnin út, og at tað nývalda býráðið átti at taka málið til viðgerðar, so skjótt tað tók við.

Leggjast skal aftrat, at einki skrivligt tilfar, uttan tað skriv, ið var komið frá Gøtu kommunu, varð lagt fram um nevnda mál.

Lagt skal verða aftrat, at eg og fleiri við mær, hava ferð eftir ferð biðið um, at fundir vórðu hildnir við bygdaráðini í grannakommununum at umrøða evnir, ið vit hildu høvdu felags áhuga. Tað fekk ikki undirtøku, og sjálvur býráðsformaðurin helt fyri, at tað kanska var óheppið, at hvør fuglur syngur við sínum nevi o.s.fr.

Einki kann verða meira oheppið, enn tá ið ein fuglur syngur einsamallur og falskt, tí tað er júst tað, sum hendi henda dagin útvarpsmaður tosaði við býráðsformannin Sigurd Simonsen.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.